# Ognarskiftistrygd
## tryggingartreytir

TRYGD

nr. 10-02
Januar 2017

www.trygd.fo

# Innihaldsyvirlit


## Alment — Síða

| | | |
|---|---|---|
| 1.1 | Lóggáva | 3 |
| 1.2 | Treyt fyri tekning av trygging | 3 |
| 1.2.2 | Trygging kann ikki teknast fyri | 3 |
| 1.3 | Nývirðistrygging | 3 |
| 1.4 | Hvør er tryggjaður? | 3 |
| 1.5 | Hvørjar lutir fevnir tryggingin um? | 3 |
| 1.5.3 | Hvørjar lutir fevnir tryggingin ikki um? | 3 |
| 1.6 | Hvørjar skaðar fevnir tryggingin um? | 3 |
| 1.7 | Hvørjar skaðar fevnir tryggingin ikki um? | 3 |

## Endurgjald — Síða

| | | |
|---|---|---|
| 2.1 | Skaðauppgerð | 4 |
| 2.2 | Hvussu verður endurgjald veitt? | 4 |
| 2.3 | Endurgjald til afturgerð av bygninginum | 4 |
| 2.4 | Avskriving fyri ávísar bygningslutir | 4 |
| 2.5 | Kosmetiskur skaði | 5 |
| 2.6 | Umvælingin seinkað | 5 |
| 2.7 | Bygningar, ið skulu verða tiknir niður | 5 |
| 2.8 | Bygningar undir endurnýgging/nútíðargerð | 5 |
| 2.9 | Sjálvsábyrgd | 6 |

## Fylgiútreiðslur — Síða

| | | |
|---|---|---|
| 3.1 | Bjarging og varðveitsla | 6 |
| 3.2 | Upprudding | 6 |

## Skaðafráboðan v.m. — Síða

| | | |
|---|---|---|
| 4.1 | Tá skaði hendir | 6 |
| 4.2 | Umvæling | 6 |
| 4.3 | Skjalprógv | 6 |

## Felagsreglur — Síða

| | | |
|---|---|---|
| 5.1 | Trygging sambært øðrum tryggingarskjali | 6 |
| 5.2 | Eigaraskifti | 6 |
| 5.3 | Gildistíð og uppsøgn | 6 |
| 5.4 | Tryggingargjald | 7 |
| 5.5 | Sertreytir | 7 |
| 5.6 | Kærumøguleikar | 7 |
| 5.7 | Iðranarrættur | 7 |

# Ognarskiftistrygd

## 1.0 Alment

### 1.1 Lóggáva

Umframt hesar tryggingartreytir er føroysk lóggáva á økinum og møguligar sertreytir í tryggingarskjalinum galdandi.

### 1.2 Treyt fyri tekning av ognarskiftistrygging

1.2.1 Tað er ein treyt fyri tekning av ognarskiftistrygging, at ein støðufrágreiðing av bygninginum fyriliggur. Støðufrágreiðingin skal verða gjørd sambært galdandi reglum í løgtingslóg nr. 137 frá 6. oktober 2011, við møguligum seinni broytingum, og sambært kunngerðum, sum eru útskrivaðar við heimild í nevndu lóg.

### 1.2.2 Trygging kann ikki teknast fyri:

1. Bygningar seldir á tvingsilssølu
2. Frágingnar bygningar
3. Friðaðar bygningar
4. Bygningar verdir at varðveita
5. Lutaíbúðir

### 1.3 Nývirðistrygging

1.3.1 Um einki annað er avtalað, er tann tryggjaði bygningurin tryggjaður til fult virði fyri samsvarandi nýggjan bygning, sí grein 2.3.

### 1.4 Hvør er tryggjaður? (tryggjaði)

1.4.1 Tryggjaður er tann tryggingartakari, ið er nevndur á tryggingarskjalinum, og sum eigur tann bygningin, ið er tilskilaður í tryggingarskjalinum.

### 1.5 Hvørjar lutir fevnir tryggingin um?

1.5.1 Tryggingin fevnir um allar bygningar á ognini, uttan so at ásett er í støðufrágreiðingini, at bygningurin ikki er kannaður av tí byggikøna.

1.5.2 Hvítvørur eru fevndar av tryggingini, um tær eru partur av bygninginum.

### 1.5.3 Hvørjar lutir fevnir tryggingin ikki um?

1. Uttandura svimjihylar/gosbað/hitapottar og hartil hoyrandi pumpur og innleggingar
2. Sólskjól og tjaldhimlar
3. Antennur og parabolir
4. Uttandura lutir av hitapumpum, vindmyllum ella øðrum útbúnaði til at gagnnýta varandi orkukeldur
5. Glasstovur og vakstrarhús
6. Aðrar lutir, ið ikki eru umfataðir av kanningini av ognini

### 1.6 Hvørjar skaðar fevnir tryggingin um?

1.6.1 Tryggingin fevnir um umvælingar av aktuellum skaðum og um fysisk viðurskifti í bygninginum, sum hava við sær nærstaddan vanda fyri skaða á tryggjaðu bygningarnar ella bygningspartarnar.

1.6.2 Hugtakið skaði í hesum føri fevnir um brot, lekar, avlaging, viknan, íkomu av rivum, oyðilegging ella onnur fysisk viðurskifti í bygninginum, sum minka munandi um virðið á ella nýtsluna av bygningunum í mun til aðrar óskaddar bygningar í sama aldri, sum eru í vanliga góðum standi. Vantandi bygningslutir kunnu vera ein skaði.

1.6.3 Hugtakið nærstaddur vandi merkir, at ein skaði eftir royndum fer at taka seg upp, um ikki serliga viðfevnd viðlíkahaldsarbeiði ella onnur fyribyrgjandi tiltøk verða sett í verk.

1.6.4 Tryggingin fevnir um skaðar og skaðaváðar, sum vóru til staðar, tá keyparin yvirtók ognina, og sum verða staðfestir og fráboðaðir í tryggingartíðini.

1.6.4.1 Við tryggingartíðarskeið er at skilja tað tíðarskeið, ið dekningur er fyri skaða. Tryggingin tekur við tann dagin, tá keyparin yvirtók ognina, og er galdandi antin 5 ella 10 ár fram – treytað av avtalaða dekningstíðarskeiðinum. Tryggingartíðarskeiðið er tilskilað í tryggingarskjalinum.

### 1.7 Hvørjar skaðar fevnir tryggingin ikki um?

1.7.1 Tryggingin fevnir ikki um:

1. Viðurskifti, sum eru nevnd í støðufrágreiðingini, uttan so, at viðurskiftini greitt eru lýst skeivt í frágreiðingini. Talan er um skeivt lýst viðurskifti, um lýsingin er misvísandi ella ikki nóg fullfíggjað, soleiðis at ein keypari, við støði í frágreiðingini, ikki hevur havt høvi at meta um veruliga slagið, vavið ella týdningin av viðurskiftunum.
2. Funktiónsviðurskiftini í bygninginum, eitt nú planloysn, innrætting og tílíkt, umframt vanliga nýtslu annars, viðurskifti viðvíkjandi tí at bygningurin er í samsvari við servituttar ella er lógligur í mun til almennar fyriskipanir og estetisk og arkitektonisk viðurskifti, uttan so, at tað sum úrslit av viðkomandi viðurskiftum er hendur ein skaði ella um vandi er fyri, at ein skaði fer at henda sambært grein 1.6.
3. Skaðar og vandar fyri skaðum í bygningspørtum, um tað í støðufrágreiðingini er nevnt, at umrøddi bygningspartur er mettur at vera gjørdur óatkomiligur fyri tann byggikøna í sambandi við byggitekniska gjøgnumgongdina.
4. Viðurskifti, har prógvast kann, at keyparin hevði kunnleika til hesi, áðrenn keyparin yvirtók ella á annan líknandi hátt fekk ræði á ognini.
5. Viðurskifti, sum keyparin annaðhvørt hevur fingið fulnað fyri eftir trygd, ella sum keyparin ikki hevur kravt at fáa fulnað fyri eftir trygd frá triðjamanni, umframt viðurskifti, sum eru fevnd av aðrari trygging.
6. Viðurskifti, sum einans fevna um vanligt slit ella vantandi viðlíkahaldi av ognini, uttan so, at tað sum úrslit av hesum viðurskiftum er hendur ein skaði ella um vandi er fyri, at ein skaði fer at henda sambært grein 1.6.
7. Viðurskifti, sum einans fevna um, at vanliga livitíðin hjá bygningslutum, konstruktiónum ella tilfari er farin.

8. Fylgiskaðar, sum taka seg upp vegna viðurskifti, sum keyparin, við støði í upplýsingum í støðufrágreiðingini, átti at havt bøtt um, um endurbøtingin hevði havt við sær, at fylgiskaðin ikki hevði tikið seg upp.
9. Viðurskifti, sum hava tikið seg upp eftir, at fulnaður er fingin fyri sama skaða, um tryggingartakarin í hesum sambandi er gjørdur varugur við, at sami skaði kundi taka seg upp av nýggjum, um orsøkin til skaðan ikki varð bøtt ella tikin burtur.
10. Viðurskifti, sum eru at meta sum bagatellir, sum beinleiðis eru sjónlig fyri einum ikki-serkønum keypara.
11. Skaðar, sum bert eru at meta sum kosmetiskir skaðar.
12. Skaðar á lutir, sum ikki eru fevndir av gjøgnumgongdini av bygningunum, og tí ikki eru partur av støðufrágreiðingini – t.d. skaðar uttanfyri bygningarnar, so sum dálking, planering, dren og kloakviðurskifti o.a.

# 2.0 Endurgjald

## 2.1 Skaðauppgerð

2.1.1 Um onnur avtala ikki er gjørd við Trygd, kann endurgjald ikki ásetast, fyrr enn skaðin er sýnaður.

## 2.2 Hvussu verður endurgjald veitt?

2.2.1 Endurgjald verður ikki veitt fyri dýrari byggitilfar enn tað, sum var í skadda bygninginum, og í mesta lagi fyri byggitilfar og byggihættir, ið vanligir vóru, tá skaðin hendi.

2.2.2 Tá endurgjald verður ásett, verður fyrilit tikið fyri broytingum í byggiprísum, ið kunnu koma fyri í vanligum byggiskeiði, roknað frá tá skaðin hendi.

2.2.3 Trygd hevur bert skyldu at rinda endurgjald, um viðkomandi viðurskifti verða bøtt, møguliga við endurútvegan ella útskifting til nakað líknandi.

2.2.4 Samlaða endurgjaldsupphæddin, sum verður útgoldin, kann ikki fara upp um kontanta keypsprísin fyri ognina við frádrátti fyri virðinum á grundøkinum, tá tryggingin tók við.

2.2.4.1 Er handilsvirðið lækkað, tann dagin skaðin hendi, í mun til virðið tá tryggingin tók við, kann endurgjaldið tó ongantíð fara uppum tað, sum bygningurin ella bygningsluturin kundi verið seldur fyri beint áðrenn skaðan.

## 2.3 Endurgjald til afturgerð av bygninginum

2.3.1 Endurgjald til afturgerð verður roknað sum nývirðisendurgjald og verður ásett til ta upphædd, sum tað eftir kostnaðinum á skaðadegnum fer at kosta at endurbyggja tað skadda sum nýtt við sama byggihátti á sama stað.

2.3.2 Umframt hetta fevnir tryggingin um príshækkan í vanligari byggitíð.

2.3.3 Um virðið av tí skadda er minkað meira enn 30% av nývirðinum vegna slit og aldur, verður endurgjaldið ásett sambært tílíkari virðisminking. Tá mett verður um virðisminking, skal t.d. verða havt í huga lutfallið millum ta tíð, luturin hevur verið brúktur og ta tíð, hann kundi verið brúktur.

2.3.4 Endurgjaldið verður útgoldið sambært rokning, tá umvælingin er liðug.

2.3.5 Verður endurgjaldið ikki nýtt til afturgerð av skaðanum sum avtalað, kann Trygd krevja tær spardu upphæddirnar afturrindaðar.

## 2.4 Avskriving fyri ávísar bygningslutir

2.4.1 Fyri niðanfyri nevndu bygningslutir verður endurgjaldið tó niðurskrivað eftir aldrinum á lutinum, tá skaðin hendi. Tað er tann samlaði skaðin á lutin, ið verður avskrivaður – tað vil siga eisini møguligar útreiðslur til handverkarar o.o. Bygninglutir, ið ikki eru nevndir í grein 2.4, kunnu avskrivast vísandi til bóklingin „Levetidstabeller“ frá forlagnum Forsikring og bóklingin „V&S Prisdata“ frá útgevaranum Byggecentrum.

2.4.2 Útreiðslur til umvælingar verða endurgoldnar eftir somu reglum.

### 2.4.3 Tekjur av pappi:

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–15 | 100 |
| 15–20 | 80 |
| 20–30 | 50 |
| 30+ | 20 |

### 2.4.4 Tekjur av græsi og øðrum náttúrurunnum tilfari:

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–20 | 100 |
| 20–30 | 80 |
| 30–40 | 50 |
| 40+ | 20 |

### 2.4.5 Tekjur og klædningur av plastikki og pvc:

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–8 | 100 |
| 8–15 | 70 |
| 15–20 | 40 |
| 20+ | 20 |

### 2.4.6 Upphitingarútbúnaður, so sum oljufýringar, heittvatnstangar, ketlar og varmavekslarar (ikki hitapumpur, brenniovnar, peisir ella útbúnaður at gagnnýta varandandi orkukeldur):

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–10 | 100 |
| 10–15 | 68 |
| 15–20 | 52 |
| 20–25 | 36 |
| 25+ | 20 |

### 2.4.7 Hitapumpur:

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–3 | 100 |
| 3–10 | 60 |
| 10–15 | 40 |
| 15+ | 20 |

Lutir uttandura eru ikki umfataðir av tryggingini, sí grein 1.5.3.

### 2.4.8 Útbúnaður til at gagnnýta varandi orkukeldur, so sum vindmyllur, sólhita- og jarðhitaskipanir

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0–10 | 100 |
| 10–15 | 60 |
| 15–20 | 30 |
| 20 + | 20 |

Lutir uttandura eru ikki umfataðir av tryggingini, sí grein 1.5.3.

### 2.4.9 Harðar hvítvørur, keramiskar kókiplátur, glas í ovnum, el-riknir motorar og el-radiatorar:

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0 – 3 | 100 |
| 3 – 10 | 70 |
| 10 – 15 | 47 |
| 15 + | 20 |

### 2.4.10 Føst gólvteppi, herundir teppi, ið eru límaði fast til eitt undirlag ella løgd á eitt undirlag, sum ikki er at meta sum liðugt gólv:

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0 – 5 | 100 |
| 5 – 8 | 60 |
| 8 – 10 | 40 |
| 10 + | 20 |

### 2.4.11 Gólválegging, so sum træ, vinyl, kork, laminat og annað:

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0 – 10 | 100 |
| 10 – 15 | 70 |
| 15 – 20 | 60 |
| 20 – 25 | 40 |
| 25 + | 20 |

### 2.4.12 Vindeygu, hurðar og framsíður av træi:

| Aldur (ár): | Endurgjald í %: |
|---|---|
| 0 – 20 | 100 |
| 20 – 30 | 60 |
| 30 – 40 | 40 |
| 40 + | 20 |

Endurgjaldið verður gjørt upp fyri hvønn lut sær.

## 2.5 Kosmetiskur skaði

2.5.1 Endurgjald verður ikki veitt fyri skaðar á útsjónd, ella mun á liti millum nýggjar lutir og teir upprunaligu.

## 2.6 Umvælingin seinkað

2.6.1 Tryggingin fevnir ikki um meirkostnað, ið stendst av, at tryggingartakarin er atvoldin til, at umvælingin er seinkað.

## 2.7 Bygningar, ið skulu verða tiknir niður

2.7.1 Fyri bygningar, ið frammanundan einum skaða, vóru ætlaðir at taka niður, verður endurgjald veitt fyri upprudding, men ikki útreiðslur til niðurtøku. Umframt hetta verður endurgjald veitt fyri bygningslutir, sum ætlanin var at brúka aftur, til tað virði teir høvdu beint frammanundan skaðanum (dagsvirði), tvs. frádráttur verður gjørdur vegna aldur og slit.

2.7.2 Endurgjald verður ikki veitt fyri at taka sundur (demontering).

2.7.3 Hevði bygningurin ikki verið tikin niður beinanvegin, verður hóskandi endurgjald veitt fyri sakn. Samlaða endurgjaldið kann tó ikki fara upp um ta upphædd, ið endurgjaldið hevði verið, varð tað ásett eftir frammanfyri nevndu reglum um skaðauppgerð.

## 2.8 Bygningar undir endurnýgging/ nútíðargerð

2.8.1 Um skaði verður uppdagaður í sambandi við umvæling ella nýtímansgerð av bygningi ella bygningsluti, verður endurgjald bert veitt fyri tær meirútreiðslur, ið standast av skaðanum, og ikki fyri tær útreiðslur, ið høvdu staðist kortini.

2.8.2 Endurgjaldið verður roknað á henda hátt:

a) Fyri teir skaddu bygningarnar/bygningslutirnar, sum áðrenn skaðan vóru ætlaðir at nýta aftur, verður endurgjaldið veitt til nývirði.

b) Fyri aðrar bygningar/bygningslutir, sum áðrenn skaðan ikki vóru ætlaðir at nýta aftur, verður bert goldið fyri útreiðslur til upprudding, men við frádrátti av spardum útreiðslum til niðurríving.

2.8.3 Endurgjaldið kann í ongum føri vera meira enn handilsvirðið á tí skadda við frádrátti fyri virðinum av grundøkinum, tá tryggingin tók við.

2.8.3.1 Er handilsvirðið lækkað, tann dagin skaðin hendi, í mun til virðið, tá tryggingin tók við, kann endurgjaldið tó ongantíð fara uppum tað, sum bygningurin ella bygningsluturin kundi verið seldur fyri beint áðrenn skaðan.

## 2.9 Sjálvsábyrgd

2.9.1 Sjálvsábyrgdin er nevnd í tryggingarskjalinum. Samlaða sjálvsábyrgdin má ikki, uttan mun til eina møguliga sjálvsábyrgd fyri hvønn skaða, fara upp um 37.000 kr. í tryggingartíðini (ár 2014).

2.9.2 Tann í grein 2.9.1 nevnda upphædd verður javnað 3. hvørt ár eftir nettoprísindeksinum hjá Danmarks Statistik. Landsstýrismaðurin kunnger triðja hvørt ár avrundaðu upphæddina.

2.9.3 Viðurskifti, hvørs virði eru minni enn 5.000 kr., eru ikki partur av samlaðu sjálvsábyrgdini, og kunnu tí ikki fráboðast Trygd.

2.9.4 Sjálvsábyrgdin verður drigin frá endurgjaldinum pr. skaðahending. Ein skaðahending er at meta sum viðurskifti, sum stava frá somu skaðaorsøk, óansæð um skaðin rakar ein ella fleiri tryggjaðar lutir, og óansæð um skaðin verður tilmeldaður í fleiri umførum.

# 3.0 Fylgiútreiðslur

## 3.1 Bjarging og varðveitsla

3.1.1 Tryggingartakarin hevur skyldu til, eftir førimuni, at fyribyrgja ella avmarka skaða, eins og Trygd hevur rætt til at seta í verk tiltøk við sama endamáli.

3.1.2 Trygd rindar rímiligt endurgjald fyri at seta í verk hetta arbeiðið.

3.1.3 Eitt møguligt endurgjald fyri bjarging og varðveitslu skal ikki teljast við í samlaðu endurgjaldsupphæddini, sum víst verður til í grein 2.2.4.

## 3.2 Upprudding

3.2.1 Tryggingin fevnir um neyðugar útreiðslur til upprudding av tryggjaðu lutunum, eftir skaðahending, ið tryggingin fevnir um.

3.2.2 Við upprudding skilst burturbeinan av bygningsleivdum, ið ikki kunnu verða brúktar sambært skaðauppgerðini.

3.2.3 Eitt møguligt endurgjald fyri upprudding skal ikki teljast við í samlaðu endurgjaldsupphæddini, sum víst verður til í grein 2.2.4.

# 4.0 Skaðafráboðan o.l.

## 4.1 Tá skaði hendir

4.1.1 Trygd skal hava fráboðan skjótast gjørligt.

4.1.2 Ringið á telefon **35 81 00** ella farið inn á **www.trygd.fo** og fráboðið skaðan.

4.1.3 **Skaðatænastan:**
Hevur tú tørv á bráðfengishjálp eftir kl. 16 gerandisdagar, tó hósdag eftir kl. 17, vikuskiftis- ella halgidagar, ber til at ringja til skaðatænastuna á telefon **32 13 12.**

## 4.2 Umvæling

4.2.1 Skaði verður umvældur í samráði við Trygd. Tó kann fyribils umvæling verða gjørd sambært avtalu við Trygd, um tað er neyðugt til tess at fyribyrgja álvarsligum fylgjum. Í aðrar mátar er ikki loyvt at ríva niður, burturbeina ella umvæla tryggjaðar lutir, fyrr enn Trygd hevur givið sítt samtykki. Er ikki biðið um samtykki frá Trygd, fellur endurgjaldsskylda felagsins burtur.

## 4.3 Skjalprógv

4.3.1 Trygd kann krevja, at tryggingartakarin skjalprógvar ella ger sannlíkt krav sítt móti felagnum.

4.3.2 Kann tryggingartakarin ikki skjalprógva ella gera sannlíkt krav sítt móti felagnum, kann hetta ávirka endurgjaldið.

# 5.0 Felagsreglur

## 5.1 Trygging sambært øðrum tryggingarskjali (dupulttrygging)

5.1.1 Er trygging fyri somu lutir og sama váða tryggjað í øðrum tryggingarfelagi, skal skaðin fráboðast bæði Trygd og viðkomandi felagi. Samstundis skal Trygd hava fráboðan um dupulttryggingina.

5.1.2 Er fyrivarni tikið í tryggingarskjalinum hjá hinum tryggingarfelagnum um, at tryggingin fellur burtur ella lækkar, um trygging er teknað sambært øðrum tryggingarskjali, er sama fyrivarni galdandi í hesi tryggingini, og tryggingarfeløgini rinda tá, vísandi til tryggingaravtalulógina grein 41-44, lutfalsligt endurgjald.

5.1.3 Er skaddi luturin umfataður av ábyrgdartrygd frá sølumanni, tænastuveiting ella líknandi, hevur tryggjaði skyldu at venda sær til ábyrgdarstillara fyri at fáa endurgjald. Trygd veitir bert endurgjald sambært tryggingartreytunum, um tryggjaði ikki fær fullan dekning frá ábyrgdarstillara.

5.1.4 Hevur Trygd veitt endurgjald vísandi til tryggingartreytirnar, gongur Trygd inn í rættindini hjá tryggjaði mótvegis øðrum, ið kunnu ábyrgdast fyri skaðan.

## 5.2 Eigaraskifti

5.2.1 Trygd skal beinanvegin hava fráboðan um eigaraskifti.

5.2.2 Nýggjur eigari er ikki umfataður av tryggingini. Somuleiðis eru veðhavari ella annar triðimaður heldur ikki umfataðir av tryggingini.

5.2.3 Um eigaraskifti hendir í tryggingartíðini, verður goldið tryggingargjald afturgoldið soleiðis:

- Innan 1 ár eftir ígildiskomu 40%
- Innan 2 ár eftir ígildiskomu 30%
- Innan 3 ár eftir ígildiskomu 15%
- Innan 4 ár eftir ígildiskomu 10%
- Innan 5 ár eftir ígildiskomu 5%

Hetta er galdandi, óansæð um tryggingin er galdandi í 5 ella 10 ár.

## 5.3 Gildistíð og uppsøgn

5.3.1 Tryggingin kann ikki sigast upp í úrtíð – hvørki av tryggingartakaranum ella Trygd. Tryggingin fer tó úr gildi, tá ognin skiftir eigara.

5.3.2 Tryggingin er galdandi ta tíðarskeið, ið er nevnt í tryggingarskjalinum, og fer úr gildi uttan uppsøgn tann dag, sum nevndur er í tryggingarskjalinum, ella tá eigaraskifti fer fram, um hetta er áðrenn.

5.3.3 Við góðkenning frá Trygd, kann trygging, ið er teknað fyri eitt 5 ára skeið, verða longd til at galda í 10 ár, tó treytað av, at ognin verður kannað av nýggjum, og at eigarin hevur hildið ognina í nøktandi standi.

5.3.4 Verður tryggingin longd, er hetta at meta sum ein nýggj trygging, og sjálvsábyrgdin byrjar at telja av nýggjum, sí grein 2.9.

5.3.5 Um keyparin doyr, og hjúnarfelagi situr eftir í óskiftum búgvi, heldur trygging fram óbroytt. Trygd skal tó fráboðast um hetta.

## 5.4 Tryggingargjald

5.4.1 Tryggingargjaldið verður goldið í einum, tá tryggingin kemur í gildi ella verður longd. Gjaldið fellur til gjaldingar, samstundis sum tryggingin kemur í gildi, og skal verða goldið, áðrenn keypari fær ræðið á ognini, í seinasta lagi yvirtøkudagin. Gjaldskravið verður sent til ta adressu, ið tryggingartakarin hevur tilskilað.

Verður gjaldið ikki goldið rættstundis, er tryggingin at meta sum ongantíð at hava verið í gildi.

## 5.5 Sertreytir

5.5.1 Um serligar treytir eru galdandi fyri tryggingina, er hetta tilskilað í tryggingarskjalinum.

## 5.6 Kærumøguleikar

5.6.1 Er ósemja millum teg og Trygd um tryggingar-viðurskifti, ella ert tú t.d. ónøgdur við avgerð, ið er tikin í sambandi við skaða, kanst tú, eftir at hava roynt semju við viðkomandi deild, venda tær til kæruviðgera okkara. Sí fleiri upplýsingar á heimasíðu okkara, **www.trygd.fo**

5.6.2 Tú hevur eisini møguleika at senda skrivliga kæru til kærunevndina fyri trygging:

**Ankenævnet for Forsikring**
Anker Heegaards Gade 2,1
1572 København V
Tlf. +45 33 15 89 00
Fax +45 33 15 89 10
Telefontíð kl. 10.00–13.00 (donsk tíð)
Heimasíða: **www.ankeforsikring.dk**

5.6.3 Serligt oyðublað til kæruna fæst á heimasíðu okkara, **www.trygd.fo** ella á **www.ankeforsikring.dk**

5.6.4 Eitt ávíst kærugjald skal gjaldast, tá kært verður. Kærugjaldið sæst á heimasíðuni hjá kærunevndini, **www.ankeforsikring.dk**. Gjaldið verður endurgoldið, um tú fært fult ella lutvíst viðhald í kæruni.

## 5.7 Iðranarrættur

5.7.1 Tú kanst angra keypið av hesi trygging.

5.7.2 Iðranarfreistin er 14 dagar. Freistin gongur frá tí degi, tú hevur fingið fráboðan um, at tryggingin er teknað. Freistin er tó í fyrsta lagi galdandi frá tí degi, tú á skrift hevur fingið upplýsing um iðranarrættin.

5.7.3 Gongur freistin út ein halgidag, leygardag, sunnudag, grundlógardag, jólaaftan ella nýggjársdag, verður freistin longd til næsta gerandisdag.

5.7.4 Um tú ynskir at angra keypið av tryggingin, skalt tú boða Trygd skrivliga frá hesum, áðrenn freistin gongur út.

**P/F Trygd**
**Tryggingarfelag**

Oknarvegur 5
P.O. Box 44
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 358 100
Fax +298 317 211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Trygd hugsar um teg

SENDISTOVAN